

*Høgni Debes Joensen, landslækni, vildi fegin, at meir gransking varð gjørd í sambandinum milum heilsu og liviumstøður annars hjá føroyingum*

# Landslæknin: Tørva heilsugransking í mun til sosiala støðu

**Tølini í nýggju frágreiðingini hjá landslæknanum tosa sítt týðiliga mál. Men vit vita framvegis ov lítið, um hvønn leiklut eitt nú sosiala støðan spælir, tá tað ræður um heilsustøðuna hjá føroyingum**
**- Vit eiga at gera ein innsats fyri at seta í verk eina skipaða gransking av hesum sambandinum, sigur landslæknin**

Landslæknafrágreiðing
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Nýggjastu tølini frá landslæknanum geva eina rættiliga greiða mynd av, hvussu nógvir føroyingar hava hvørjar sjúkur, og hvørjum teir doyggja av. Men vit vita framvegis lítið og onki um sambandið millum heilsustøðuna hjá føroyingum og teirra liviumstøður annars.

## Annar hvør ov feitur

Sum fleiri uttan iva longu høvdu gitt, hava vit lítið at reypa av, tá tað kemur til roykivanar hjá føroyingum. Vit eiga fyrstaplássið í Norðurlondum, tá tað ræður um royking, og samanlagt roykja føroyingar dupult so illa, sum íslendingar. Hartil kemur, at føroysku kvinnurnar roykja rættiliga

*Framhald á bls. 8*




# Skipasmiðjan søkir eftir søluleiðara

Nýggjar tíðir krevja nýtt fólk. Tí leita vit eftir einum fólki, ið saman við stjórnini skal mynda fyritøkuna úteftir sum fremsti veitari av tænastum og eykalutum til sjó- og siglingarøki.

Søludeildin er skipað sum deild við beinleiðis tilvísing til stjórnina. Undir søludeildini eru virkisøkini: Goymslur, útleigan og marknaðarføring.

**Starvið**
Sum søluleiðari á Skipasmiðjuni fert tú at hava ábyrgd av at menna søludeildina, herundir at samskipa alla sølu av vørum og tænastum, so at vit støðugt kunnu veita viðskiftafólki okkara, bæði á sjógvi og landi, tað bestu og skjótastu tænastuna.

Tú hevur handilsútbúgving. Tú hevur royndir frá líknandi starvi og hevur gott innlit í marknaðar- og samfelagsviðurskifti annars.

**Aðrir eginleikar eru:**
- Opin og fyrikomandi, hevur tænastuhugburð
- Hevur lætt við at samskifta bæði munnliga og skrivliga
- Dugur mál,føroyskt, norðurlendsku málini og enskt
- Hevur góðan telduførleika
- Ert framfýsin og ágrýtin

**Vit bjóða**
Vit bjóða eitt sjálvstøðugt og avbjóðandi starv í einum spennandi og virknum umhvørvi við góðum møguleikum fyri yrkisligari og persónligari menning. Løn og eftirløn verða ásett eftir nærri avtalu.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til:

P/F Tórshavnar Skipasmiðja
Postsmoga 65
110 Tórshavn
Att.: Magnus Magnussen

Merk brævbjálvan: Søluleiðari

Í seinasta lagi tann 22. august 2005. Hevur tú okkurt at spyrja um hesum viðvíkjandi, kanst tú venda tær til Magnus Magnussen á tlf. 30 11 00 ella við teldupostí til: magnus.magnussen@faroeyard.fo.

*Á p/f Tórshavnar Skipasmiðju starvast um 260 fólk við at veita tænastur og sølu av eykalutum til skipaflotan og vinnuna á landi. Hesar tænastur fata um stál, rustfrítt stál, aluminium, timbur, máling, beding, mekaniskar tænastur, tekniska ráðgeving og beinleiðis sølu. Skipasmiðjan hevur deildir í Havn, á Skála, í Vestmanna og í Runavík.*

**P/F Tórshavnar Skipasmiðja**
*Tlf. +298 30 11 00*
*Fax +298 30 11 01*
*www: faroeyard.fo*
*e-mail: info@faroeyard.fo*

SKIPASMIÐJAN